**Setanarrøða hjá landsstýriskvinnuni "Lívið tætt at sálarsjúku"**

Góðan dagin øll somul,

Tað er so sera hugaligt og stuttligt at síggja so nógv fólk uppi í Norðurlandahúsinum í dag og eg skilji á fyrireikarunum, at fullteknað er til ráðstevnuna.

Tit í Sinnisbata eiga eina stóra tøkk fyri, at tit hava sett ljóskastaran á hetta so týdningarmikla evnið og stóra fjøldin - sum er møtt her í dag - ber boð um, at vit eru mong, sum so ella so eru avvarðandi hjá onkrum, ið stríðist við sálarsjúku.

Tá eg sat og fyrireikaði meg til dagin í dag, las eg um hetta at vera avvarðandi.

Internetið leiddi meg fram á bókmentir, ið vístu kláran evidens um, at sannlíkindi fyri at viðgerðin riggar er fleiri ferðir betri, um tey avvarðandi eru við, tá ið heilsuverkið veitir hjálp til fólk við svárari sálarsjúku.

Hesar kanningar eru lutfalsliga nýggjar og í heila tikið er tað ein nokkso modernað hugsan, at eisini tey avvarðandi eiga verða hugsaði inn í viðgerðina.

Jú, gaman í hava heilsutænasturnar havt ans fyri teimum avvarðandi, men hetta - at hava avvarðandi við sum ein integreraðan part av viðgerðini - er nýtt.

Tað veit eg, at umboð fyri Psykiatriska depilin fara at nema meira við seinni í dag, men eg kann eg vil kortini brúka hetta høvið til at gleðast um, at eisini viðgerðarhátturin her heima í Føroyum fylgir nýggja rákinum. Her verður arbeitt við avvarðandi umboðum, psyko-edukatión og øðrum metodum, sum peika frameftir.

Vit eru enn ikki komin á mál, men ein góð og neyðug menning er í gongd.

----

Í heila tikið er stór menning á tí psykiatriska økinum í Føroyum í dag.

Stór tøk eru tikin av eldsálum á økinum – sum til dømis tit í Sinnisbata - og mongu góðu starvsfólkini, sum dag og dagliga arbeiða á økinum, hava seinnu árini tikið lógvatak um psykiatriina og sálrheilsuna.

Hetta er ein jalig og gevandi gongd, sum vit í politisku skipanini eisini hava roynt at raðfest.

Psykiatriska økið hevur í mong ár verið eitt hjartamál hjá mær og nú hetta samgonguskeiðið er um at renna frá okkum, er nokkso hugaligt at taka saman um nøkur av málunum, sum eru nádd.

Alt snýr seg um javnbjóðis rættindi til borgararnar. Sál og likam, sinn og skinn skulu hava somu rúmd og somu rættindi.

Hesi skjótt fýra árini er økispsykiatriin rullað út um alt landið og eru psykiatrisku heilsutænasturnar eisini komin tættari øllum borgarunum í Føroyum. Hetta er ein bati, sum eg eri ótrúliga fegin um – gongidn hevur eisini víst, at hetta ger stóran mun fyri fólk kring landið.

Tað er ein farin tíð, at vit bert eiga ein psykiatara í føroyska heilsuverkinum, tí seinnu árini eru fleiri komnir aftrat, bæði til børn og vaksin.

Tað ger sera stóran mun og merkir at nógv fleiri ambulantar viðgerðir eru á Psykiatriska deplinum enn nakrantíð áður. Við øðrum orðum – nógv fleiri føroyingar fáa hjálp fyri sálarligu sjúkuna.

Fyri at verða innan veggirnar á Psykiatriska deplinum, so hava umvælingar verið gjørdar á innleggingardeildini - broytingar sum gera stóran mun, meðan bíðað verður til nýggi meginbygningurin oman móti Sandagerði verður liðugur.

Deildin var í sera ringum standi og sum avvarðandi óttaðist tú, at manglandi umsorgan fyri kørmunum endurspeglaði umsorganina fyri sjúklingunum. Tað ger støðuna ótrygga, hóast tú skjótt lærdi, at eitt er karmar og eitt annað er viðgerðin.

Eg kann eisini til stuttleika nevna, at tað var undir hesi samgongu, at landsstýriskvinnan í almannamálum hækkaði játtanina til Sinnisbata nokkso fittliga.

Havi skilt á tykkum Sinnisbata, at peningurin hevur verið við at ment arbeiðið hjá felagnum og sum áskoðari kann eg eisini sanna, at Sinnisbati er vorðin ein sera sjónligur aktørur á økinum seinnu árini.

Sinnisbati luttóku eitt nú í arbeiðinum at gera eina heildarætlan fyri sálarheilsuna í Føroyum, sum varð handað mær í heyst. Hetta er stórt og gott arbeiði við tilsamans 39 spennandi tilmælum, sum røkka tvørtur um geirar.

Øll verða ikki til veruleika í einum, men nøkur teirra hava vit sett hol á longu nú.

Vit vita at tað er alsamt fleiri børn sum mistrívast. Tað mugu vit gera nakað við á fleiri økjum. Vit hava sett á stovn nýtt dagtilboð í barna- og ungdómspsykiatriini. Men eisini í fyribyrgjandi arbeiðinum eru átøk framd.

Heimildirnar hjá Gigni eru víðkaðar til at gera skúlabarnakanningar og játtanin er økt, so heilsufrøðingar kunnu varðveita sambandið við børnini sum eru millum 2 og 5 ár,

Eisini hevur Fólkaheilsuráðið undir hesari samgonguni sett sjóneykuna á at styrkja sálarheilsuna hjá fólki.

Við at varpa ljós á tey viðurskifti, ið eru góð fyri sálarheilsuna kunnu vit vónandi fyribyrgja sálarsjúku í ein ávísan mun.

Vísindaligar kanningar hava prógvað, at tað at vera virkin, at vera partur av einum felagsskapi og og at vera hugbundin er gott fyri sálarheilsuna og kann vera við til verja okkum, tá ið lívið gerst torført. Tað er hetta Fólkaheilsuráðið, kommunur, felagsskapir, samkomur og onnur samstarva um fyri at fyribyrgja sálarligum avbjóðingum.

Tí øll verða rakt av lívsins tubulensi so ella so. Eitt nú um ein vit eru góð við gerst sálarliga sjúk, sum jú er evnið í dag: Lívið tætt at sálarliga sjúku.

----

Í mínum hugaheimi eru tað serliga tvey atlit at taka og hava í huga, tá tað kemur til leiklutin hjá teimum avvarðandi.

Ja, vit skulu hugsa tey avvarðandi við í viðgerðina. Bæði tí at tey avvarðandi sum heild ynskja tað, men eisini tí tað virkar. Kanningar vísa eisini, at har liggur eitt risa tilfeingi, sum kann aktiverast, um vit bera okkum rætt at.

Í øðrum lagi er tað av avgerandi týdningi at vit ikki gera hetta í blindum. Ikki øll kunnu luttaka sum stuðul og gerast ein integreraður partur av eina viðgerð.

Varsemi skal ráða – ikki minst tá talan er um børn. Men eisini í heila tikið.

Sum eg var inni á í byrjanini, so kann tað gerast ómetaliga møtimikið í longdini at vera avvarðandi.

Tað skulu vit hava fyri eygað í øllum tí vit gera. Í Danmark hevur landsfelagið fyri avvarðandi hjá sálarsjúkum kanna ymisk viðurskifti hesum viðvíkjandi.

Tey avvarðandi ynskja at fáa ítøkiliga vitan og amboð til at hjálpa og tey ynskja generelt at luttaka í sjálvari sjúklingagongdini. Sambært donskum kanningum, so føla 60 prosent av teimum spurdu seg ikki vera í nóg stóran mun tikin við í viðgerðina.

Á hinum bógnum søgdu tey seg hava brúk fyri ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð, tí ábyrgdin var stór og trýstið øgiligt, at fleiri snøgt sagt ikki megnaðu uppgávuna í longdini. At verða avvarðandi hjá álvarsliga sjúkum menniskjum – tað verði seg likamliga ella sálarliga sjúk – er belastandi og hart.

Spurningurin um at veita bæði avvarðandi og tí sjúka sjálvum, um talan er um álvarsliga likamliga sjúku, sálarfrøðiliga hjálp, var eisini nevndur í Menningarætlanini fyri sjúkrahúsverkið.

Vit eru so smátt farin undir fyrireikingarnar til slíka sálarfrøðiliga eind í sjúkrahúsverkinum, men enn er nakað á mál. Vit eru á veg – eisini hesum viðvíkjandi. Vónin er, at tú sum familja, vinur og starvsfelagi fær hjálp, so TÚ kanst gera mun sum avvarðandi.

Eg fari ikki at siga so nógv meira her í dag. Eg fari at enda við at takka tykkum fyriskiparar í Sinnisbati enn einaferð fyri at reisa hetta evnið og eisini ein tøkk fyri at tit góvu mær høvið at siga nøkur orð í dag.

Samanumtikið so snýr alt seg um at skapa eitt samfelag, sum rúmar øllum. Hans Andrias Djurhuus lýsir tað so væl í yrkingini um dáan. Tá øksini á bønum ilskast inn á dáan, sum sær øðrvísi út.

“Men dáin stendur í iva og hann hevur ymsan lit. Eg havi væl loyvi at liva her líka so væl sum tit”.

Takk fyri og góða ráðstevnu øll somul!